

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 09 - 2012

# Borifeløg lata dyrnar upp fyri føroyingum

Statoil, sum er fyristøðufelag fyri boringini á Brugdu leitimiðinum á føroyska landgrunninum, tekur nú stig til kunnandi fund, har dyrnar til nakrar av teimum stóru útlendsku veitarunum til boringina verða latnar upp. Hesir eru COSL, Halliburton og M-I SWACO. Fyritøkurnar taka sær av boringini og ymsum týðandi uppgávum umborð á boripallinum Cosl Pioneer. Tiltakið verður í Kaffihúsinum í Havn týskvøldið 11. september frá kl. 1900. Umboð frá COSL, Halliburton og M-I SWACO fara at greiða frá um virksemi teirra og høvið verður at seta spurningar. Aftaná verður eitt lættari ábit og høvið verður at práta saman. Dagin eftir hava tey, sum hava áhuga, møguleika at fáa fund við veitararnar. Allur dagurin er settur av til fundir. Hetta verður eisini í fundarhølum í Kaffihúsinum, á 2. hædd. Oljan.fo skilur, at tankin aftanfyri tiltakið er at nýta høvið at bjóða vinnuni og áhugaðum føroyingum at hitta hesi stóru veitarafeløg, í oljuhøpi, nú vit hava tey her, meðan borað verður. Tey, sum ynskja at vera við til tiltakið, kunnu fara inn lysing fra Statoil a oljan.fo. Myndir - M.a. fara umboð fyri borifelagið COSL at greiða frá teirra fyritøku og arbeiði á fundinum í Havn týskvøldið. Boristjóri hjá felagnum, nú borað verður í Føroyum, er Jan Bergsholm. Cosl og hinar báðar veitarafyritøkurnar hava skrivstovu á Bryggjubakka, har tey fylgja boringini á landgrunninum.